# Hava tað mesta til skipini

**– Tað vit ikki klára einsamøll, klára vit í samstarvi við onnur, sigur Karl Birgir Isaksen, handilsmaður**

EYKALUTIR

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin

Fish Fair er ein góður sýnisgluggi at vísa tað fram, sum vit hava at bjóða.

Men fiskivinnustevnan er eisini eitt frálíkt høvi hjá eini fyritøku til at hitta síni viðskiftafólk.

Tað heldur Karl Birgir Isaksen, handilsmaður í Klaksvík.

- Har koma túsundtals fólk og tað er kanska eitt tað mest spennandi við Fish Fair, at hitta viðskiftafólk beinleiðis, tí tað fáa vit ikki so nógv høvi til annars.

- Sostatt er tað avgjørt eisini eitt endamál við at taka lut á stevnuni, at røkja tey viðskiftafólk, sum vit hava, og helst eisini møta nýggjum viðskiftafólkum.

- Tað eru vit altíð spentir upp á, sigur Karl Birgir Isaksen.

**Stórt úrval**

Fyri seks árum síðani stovnaði Karl Birgir Isaksen handilsvirkið, KBI, sum síðani reisti fyrsta virkisbygningin í nýggja Klingrugarðinum í Klaksvík, har tey nú halda til í einum húsi upp á 1200 fermetrar.

Síðani virkið varð stovnað, hava tey ment seg alla tíðina og nú eru tey átta fólk, sum arbeiða á fyritøkuni.

Og tað ger tað avgjørt ikki verri, at Klingrugarðurin er beint við Norðoyatunnilin, tí tunnilin hevur stóran týdning fyri virksemið hjá KBI.

- Hann ger tað sjálvandi munandi lættari og ómakaleysari at ferðast runt landið við vørum og tænastum til okkara viðskiftafólk.

KBI hevur verið á Fish Fair báðar tær seinastu ferðirnar, so hetta er triðju ferð, at hann er við.

Og umframt at hitta viðskiftafólk, fer KBI sjálvandi at hava eitt úrval við av tí, sum tey hava at bjóða.

Og Karl Birgir Isaksen hevur nógv av vísa fram.

Í Klaksvík hevur KBI ein stóran handil við maskinum, amboðum og útgerð til handverkarar.

Nakað av tí úrvalinum verður at síggja á Fish Fair.

Men á Fish Fair hevur tað kanska serligan áhuga at vísa tær vørur fram, sum hava við skip á gera.

Og tað er ikki so lítið, tí teir hava ein stórt úrval av øllum møguligum vørum til skip.

- Vit umboða Castrol í Føroyum og selja olju frá teimum. Men harafturat hava vit eitt stórt úrval av lutum til tann tekniska partin av skipinum.

- Á tí tekniska økinum, hava vit lutir til alt, sum melur á einum skipi, heldur Karl Birgir Isaksen fyri.

KBI umboðar nevniliga svensku fyritøkuna, SKF, sum ger legur, reimar, lutir til transmissión o.s.fr.

Men tey umboðar eisini Nordgren, sum ger luftstýringar og stempul og annað. Og sum umboð fyri Unitor kunnu tey eisini útvega skipum alskyns sløg av kemiskum evnum, bæði tilsetning til kølivatn, til at reinsa við og til annað mangt.

Og skal skipið -ella virkiðvaskast, klára tey á KBI eisini tað, tí tey klára eisini at útvega hátrýstreinsarar og vaskiskipanir og annað í hesum sambandi.

- Men vit kunnu eisini útvega at kalla allar eykalutir til skip.

- Og tað, vit ikki klára at útvega sjálvi, klára vit vit at útvega saman við øðrum.

Tað eru bæði føroysk og útlendsk skip og virki, sum keypa frá teimum og teir levera sjálvandi um alt landið – og uttanlands.




Á KBI hava tey nógv av tí, sum skip hava brúk fyri og teir kunnu útvega at kalla allar eykalutir


